# við Lakeside







**Talan varð í allar mátar um eina frálíka og frískliga náttúruuppliving hjá búfólkunum á Ellis- og avleimisheiminum í Vágum**



góðum. Túrurin heim aftur var eisini eitt satt upplivilsi, tá ein vælhýrdur og tíðindafróður Ólavur greiddi frá ymiskum staðarnøvnum og hendingum niðri á vatni. Um alt baksið fólk høvdu fyrr í tíðini við torvskurði og øðrum, um at føra og reiða tað til hús, eitt nú til Sandavágs. Ja, summi mintust hvussu tað var at vera burtur í haga og ræðast tarvin. Á Krikasandi mintust fleiri hvussu ternur í túsundatali savnaðust á sandinum, fyri so, alt í einum at flúgva avstað, - út í stóru verð. Nú eru ikki so nógv ternureiður frammi við vatninum og í haganum sum fyrr.

Ein avbera góð útferð var nú komin at enda. Øll vóru upplívgaði, glað og vælnøgd. Sum Lily helt fyri: "ein alle tiders túrur". Øll eru samd um at gera túrin umaftur næsta ár, hvør ið hevur lív og heilsuna.

Tøkk til fyriskiparar/starvsfólk á ellisheiminum. Tað er gott at vita, at okkaru kæru gomlu eru í so tryggum og góðum hondum. Góða eydnu og eitt gott summar ynskja vit tykkum øllum.